# Heilsan til haldararnar av FF-blaðnum




*- Lesararnir av FF-blaðnum verða kortini ikki heilt snýttir, hóast blaðið er farið í søguna. Hetta sæst í Sosialinum í dag, sum í nýggjum tátti, Miðvikan, partvíst fer at halda áfram, har FF-blaðið slepti. Í fyrsta umfari er tað sum framhald av røðini um 100 ára gamla fiskimannin Andrias í Tarti, sigur Óli Jacobsen*

Ein av mínum mest gevandi uppgávum í Fiskimannafelagnum var at kunna skipa fyri útgávuni av FF-blaðnum. At kunna geva eitt blað út er ein uppløgd uppgáva hjá einum fakfelag. Lutvíst sum eina kunning av limum felagsins og eisini sum eitt andlit mótvegis teimum almennu Føroyum.

Sjálvur haldi eg eisini, at blaðið var eitt avrik. Tað kom út við einum títtleika og innihaldi, sum ikki gav bløðum hjá 100 ferðir so stórum donskum fakfeløgum nakað eftir.

Tað var eisini hugaligt at síggja, hvussu væl blaðið var umtókt millum lesararnar. Nógvir søgdu blaðið vera tað besta í landinum, og fleiri hildu ikki onnur bløð. Tað er eingin ivi um, at blaðið hevði stóran týdning fyri virðingina av Føroya Fiskimannafelag millum manna og harvið eisini fyri virðingina av fiskimonnum, hóast hetta ikki kann gerast upp í krónum ella prosentum. Men at hetta hevur verið fiskimonnum at gagni er eingin ivi um.

Við formansvalinum herfyri hvarv førleikin hjá fiskimannafelagnum fyri hesum partinum av virkseminum hjá felagnum. Síðan tá hevur ein hópur av fólki givið til kennar, hvussu hørm tey eru um, at FF-blaðið á hendan hátt skuldu fara í søguna. Eisini uttanlands hava fólk harmast um hetta, og eru hesi so langt burtur sum í Ruslandi, Týsklandi, Canada, Noregi, Ísrael, Italia, Bretlandi og Danmark. Millum hesi eru fólk í fremstu røð á altjóða fiskivinnuøkinum.

Eg vil hervið takka øllum tykkum, sum hava víst, at tit hava virðismett FF-blaðið. Fleiri hava givið til kennar, at nógv av tilfarinum átti at komið út í bók, og hetta taki eg sum eina serliga viðurkenning av mínum virksemi. Undir øllum umstøðum er stórur partur av søgu fiskimanna varðveittur við blaðnum.

Lesararnir av FF-blaðnum verða kortini ikki heilt snýttir. Hetta sæst í Sosialinum í dag, sum í nýggjum tátti, Miðvikan, partvíst fer at halda áfram, har FF-blaðið slepti. Í fyrsta umfari er tað sum framhald av røðini um 100 ára gamla fiskimannin Andrias í Tarti.

Umframt hetta verður helst eisini annað tilfar úr FF-blaðnum sum t.d. tey væl umtóktu grønlandstíðindini hjá Kára við Stein.

Besta trygdin fyri at fáa hetta tilfar framyvir er at halda Sosialin, men annars ber eisini til at keypa hann í leysasølu mikudagar, tá Miðvikan er í. Eg vil eisini takka Sosialinum fyri hansara áhuga fyri hesum tilfari.

Tískil verður hesin Sosialurin sendur til allar haldararnar av FF Blaðnum.

Eg harmist saman við lesarunum av FF-blaðnum um tess lagnu. Vóni framvegis at hava samband við tey, sum stuðlaðu blaðnum so ella so. Eg kann hittast á tlf. 31 5769 ella telduposti: olijacobsen@post.olivant.fo

olijacobsen@post.olivant.fo

**Óli Jacobsen**





Haldið Sosialin – altíð við tí nýggjasta!

Send ein t-post til
post@sosialurin.fo
ella ring 34 18 00

# TILBOÐ

**Fáið Sosialin restina av ársfjórðinginum**

**ókeypis**

við at gjalda fyri næsta ársfjórðing

**Ja takk!** Eg ynski at tekna meg sum haldara av Sosialinum, og fái blaðið borið út 5 ferðir um vikuna

Verður sent óposiað. Sosialurin rindar postgjaldið

64

Navn:

Bústaður:

Bygd / býur:

Telefon:

Undirskrift:

**Besta keldan til:**

- » Vinnulívið
- » Ítrótt
- » Mentan
- » Politik
- » Bilar
- » Merkisdagar
- » Heilsanir
- » Tiltøk
- ...o.m.a.

**Send lepan til:**

Sosialurin
Boks 76
FO-110 Tórshavn